## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Um morgunin gul av landsynningi, regn og mjørki, men sum frálíður støkkur hann vesturum til útsynning og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin og fríggjadagin:**
Fleyr til gul av útsynningi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og regn av og á. Hitin millum 10 og 14 stig.

– – –

Juli mánaði var bæði lýggjur og turrur. Miðalhitin var 11,0° móti 10,3°. Avfallið var bert 31,2 mm móti 83,4 mm í miðal.

# Líggin gongur grasið fellur

**Hoyterrin hevur nógvastaðni verið av tí besta í vikuni eftir ólavsøku. Nógvastaðni eru fólk liðug at hoyggja**

Í HOYNA
*Edvard Joensen*

Vikan eftir ólavsøku var terravika av Guðs náði nógvastaðni í landinum. Slíkan terra hava fólk ikki vitað um í longri tíð, verður látið at, og fleiri siga frá, at tey vórðu liðug at hoygga eftir trimum, fýra døgum.

– Tað altíð nógv at tríva í, men tað er ein Harrans lætti at vita sær, at man longu er liðugur at hoyggja fyrstu viku í august. Eg kenni ikki til sovorðið, segði ein bóndi vestaneftir, sum Sosialurin hitti um vikuskiftið.

Veðrið var av tí fagrasta vestanfyri alla seinastu viku. Allastaðni var bøurin fullur av fólki, sum var »í hoyggj«, sum sagt verður har á leiðini.

Onkur hendingur hevði sligið okkurt stykki fyri ólavsøku, men týsdagin varð sett á av álvara, og tá fríggjadagurin var av, vóru fleiri longu liðug at hoyggja.

Tað er ein serligur hugni í hesum at síggja alt hetta fólkið í bønum. Tað yður av lívi, og ein fær ikki annað enn leitað aftur til Mikkjal á Ryggi og hansara hoyggingarsang um lívið á bønum og sanna, at enn í dag er ikki so ólíkt tí, sum tá var.

Hóast vit í dag neyvan síggja gamla sløttumannin meira, og fleiri eru, sum ikki vita, hvat ein líggjaskógvur er.

Í dag verður alt sligið við maskinum og tey, sum mest avanserað eru, hava eisini fingið sær vendarar og ristarar, sum settir verða á sláimaskinuna, hóast talan bert er um at hoyggja til nakrar seyðir. Jú, tøknin hevur eisini tikið yvir á bønum, kunnu vit sanna.



*Í dag verður mestsum alt sligið við maskinu*
*Mynd: Edvard Joensen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | 22 |
| Halifax | 21 |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 18 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 19 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 22 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 20 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 33 |
| Malta | 38 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 26 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 20 |
| New York | 32 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 12 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1010 hPa sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og kuldabrúgvin haðani fer eystureftir um Føroyar mikumorgunin.




Lágtrýstið millum Íslands og Føroya fer norðureftir og grynnist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/08 kl. 06[00]– 06/08 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 12,5°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 05/08 kl. 06[00]– 06/08 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 0,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

30. juli: Mánin longst frá jørðini
1. aug.: Seinna kvarter
8. aug.: Tendring
10. aug.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. aug | 06.08 | 18.35 | 05.08 | 17.35 | 05.23 | 17.50 | 08.08 | 20.35 | 09.08 | 21.35 | 04.23 | 16.50 | 03.23 | 15.50 | 06.23 | 18.50 | 07.23 | 19.50 | 05.53 | 18.20 | 07.08 | 19.35 |
| 8. aug | 07.02 | 19.28 | 06.02 | 18.28 | 06.17 | 18.43 | 09.02 | 21.28 | 10.02 | 22.28 | 05.17 | 17.43 | 04.17 | 16.43 | 07.17 | 19.43 | 08.17 | 20.43 | 06.47 | 19.13 | 08.02 | 20.28 |
| 9. aug | 07.53 | 20.19 | 06.53 | 19.19 | 07.08 | 19.34 | 09.53 | 22.19 | 10.53 | 23.19 | 06.08 | 18.34 | 05.08 | 17.34 | 08.08 | 20.34 | 09.08 | 21.34 | 07.38 | 20.04 | 08.53 | 21.19 |
| 10. aug | 08.43 | 21.07 | 07.43 | 20.07 | 07.58 | 20.22 | 10.43 | 23.07 | 11.43 | — | 06.58 | 19.22 | 05.58 | 18.22 | 08.58 | 21.22 | 09.58 | 22.22 | 08.28 | 20.52 | 09.43 | 22.07 |

5 707265 100036 >